


*- Likviditeturin hjá Smyril Line hevur verið tungur, og tað er dýrt er vera fátækur, sigur Thomas Magnussen, nevndarformaður í P/F Smyril Line, sum sær stórar møguleikar í, at Smyril Line keypir meirilutan av partabrøvunum í Fjord Line*

# Tað gongur betri og betri hjá Smyril Line

**Nevndarformaðurin í Smyril Line, Thomas Magnussen, sigur, at ætlanin um keyp av meirilutanum í Fjord Line í fyrsta lagi hevur til endamáls at skapa eitt tryggari grundarlag undir Smyril Line**

KEYP

*Vilmund Jacobsen*

*vilmund@sosialurin.fo*

Thomas Magnussen, nevndarformaður í P/F Smyril Line, sigur, at umskipanin av norska reiðaríinum, Fjord Line, verður løgd fyri partaeigararnar til støðutakan á eykaaðalfundi, og hann væntar, at hetta verður gjørt um einar 14 dagar ella so. Partaeigararnir í P/F Smyril Line skulu eisini góðkenna keypið av partapeninginum í norska felagnum.

Nevndarformaðurin sigur, at av teimum tilsamans 76 miljónum krónunum, sum skulu útvegast, seta Framtaksgrunnurin og íløgufelagið hjá Tryggingarfelagnum Føroyar, P/F Holding, einar 26-27 miljónir krónur í felagið, og parturin hjá hesum báðum feløgunum verður tvíbýttur við einum helmingi í part. Restin av peninginum kemur so Shetland Development Trust við.

- Eftir at hava verið í fíggjarligum trupulleikum, er P/F Smyril Line við fullari ferð á veg uppeftir. Vit hava fingið tamarhald á útreiðslunum, og inntøkumøguleikarnar eru betraðir.

Thomas Magnussen væntar, at tað hevði borið til at fingið felagið at hingið saman fíggjarliga við tí gongd – og framgongd, sum hevur verið, men hann heldur, at ætlanin um at keypa meirilutan av partapeninginum í Fjord Line er skilagóð, tí hon skapar nýggjar og øktar møguleikar.

- Likviditeturin hjá Smyril Line hevur verið tungur, og tað er dýrt er vera fátækur, sum hann tekur til.

Nevndarformaðurin sigur, at ætlanin um keyp av meirilutanum í Fjord Line í fyrsta lagi hevur til endamáls at skapa eitt tryggari grundarlag undir Smyril Line.

- Men vit høvdu ikki stevnt ímóti hesum, um vit ikki eisini trúgva upp á, at tað fer at bera til at reka bæði feløgini við vinningi, sigur Thomas Magnussen, nevndarformaður í Smyril Line.

Jákup Mikkelsen og Niclas Heri Jákupsson:

# Keypa P/F Esmar Simonsen á Kambsdali

**Nú "múrarnir" fara at lata seg upp millum Norðoyggjar og meginøkið við undirsjóvartunli, kundi onkur kanska óttast, at peningasterkar fyritøkur á meginøkinum fara at uppkeypa ein part av vinnulívinum í Klaksvík, men tað fyrsta, vit síggja, nú fasta sambandið nærkast, er júst tað øvuta; tað eru klaksvíkingar, sum eru fyrstir at gera íløgur í vinnulívið á meginøkinum**



*Í dag verður endalig avtala undirskrivað um, at Jákup Mikkelsen og Niclas Heri Jákupsson keypa P/F Esmar Simonsen á Kambsdali*

EIGARASKIFTI

*Vilmund Jacobsen*

*vilmund@sosialurin.fo*

Klaksvíkingarnir, Jákup Mikkelsen, sum hevur Kjølbro-heilsøluna og Niclas Heri Jákupsson, sum hevur Shell í Norðoyggjum, hava gjørt avtalu um keyp av fyritøkuni, P/F Esmar Simonsen á Kambsdali.

Í samrøðu við Sosialin fyrrapartin í gjár, vildi Jákup Mikkelsen, sum eisini er løgtingsmaður, ikki vátta, at keypið endaliga er komið upp á pláss.

Sosialurin veit tó frá álítandi keldum, at avtalan um keyp er gjørd, og at endaligi sáttmálin millum partarnar verður undirskrivaður fyrrapartin í dag.

Tað hevur ikki eydnast okkum at fáa upplýst keypsprísin fyri fyritøkuna, P/F Esmar Simonsen.

## Klaksvíkingar keypa

Nú "múrarnir" fara at lata seg upp millum Norðoyggjar og meginøkið við undirsjóvartunli og harvið føstum sambandi, kundi onkur kanska óttast, at peningasterkar fyritøkur á meginøkinum fara at uppkeypa ein part av vinnulívinum í Klaksvík.

Men nú Jákup og Niclas Heri keypa P/F Esmar Simonsen, síggja vit júst tað øvuta; at norðoyingar keypa seg "inn" á Kambsdali, har fleiri vinnuvirki eru.

Sjálvur vildi Jákup Mikkelsen fyrrapartin í gjár einki siga um avtaluna, sum er gjørd millum partarnar, men Sosialurin veit við vissu, at keypið er so nær undir landi, at almenningurin fær at vita um handilin í morgin, tá ið endaliga avtalan er undirskrivað.

# Smyril Line verður høvuðseigari í Fjord Line

**Í tíðindaskrivi í gjár, boðaði Smyril Line frá, at felagið nú stendur fyri nýggjum inntøku- og vakstrarmøguleikum, nú felagið hevur møguleikan at ogna sær meirilutan av partapeninginum í norska reiðaríinum, Fjord Line. Nevndarformaðurin í P/F Smyril Line, Thomas Magnussen, sigur, at felagið saman við Fjord Line fer at kunna reka virksemið meira effektivt og við størri lønsemi**

KEYP

*Vilmund Jacobsen*

*vilmund@sosialurin.fo*

P/F Smyril Line sær nú fram til eitt nýtt og sterkt samstarv, nú felagið kann gerast høvuðspartaeigari í norska reiðaríinum, Fjord Line. Smyril Line stendur nevniliga í boði at seta pening í norska felagið, og føroyska reiðaríið hevur givið eitt treytað tilboð upp á hetta.

Í tíðindaskrivi sigur Smyril Line, at "hesar báðar ferðavinnu-og flutningsfyritøkurnar nú kunnu koma í sama samtak, eftir at umfatandi broytingar verða framdar í fíggjar-og ognarviðurskiftunum í feløgunum.

- Størsta broytingin fer fram hjá Fjord Line. P/F Smyril Line skal ætlandi seta 50 norskar miljónir krónur í felagið og kann við hesum ogna sær 66% av partapeninginum. Fyrrverandi eigararnir, TFDS og Fjord1, seta eisini pening í og fáa 34% av partapeninginum í sín part. Hetta merkir, sigur Thomas Magnussen, nevndarformaður í P/F Smyril Line, at Fjord Line, tá handilin er avgreiddur, gerst dótturfelag hjá føroyska felagnum.

Hann heldur, at Smyril Line við hesum stendur framman fyri nýggjum inntøku- og vakstrarmøguleikum.

- Saman við Fjord Line ber til at reka virksemið effektivt og við størri lønsemi, sigur Thomas Magnussen.

Hann vísir á stórar fyrimunir, sum hann heldur eru við samstarvinum millum feløgini.

- Umframt at feløgini eru í sama vinnubólki, reka tey sama slag av skipum, ið sigla upp á Hanstholm og Bergen, og báðar fyritøkur marknaðarføra seg á sama marknaði.

Thomas sigur, at tilsamans verða 75 miljónir norskar krónur settar í Fjord Line, og av teimum telur partapeningurin frá P/F Smyril Line 50 miljónir norskar krónur, meðan gomlu partaeigararnir koma við 25 miljónum krónum.

- Ein partur av fíggjarligu nýskipanini í Fjord Line ber í sær, at partapeningurin, ið higartil hevur verið í felagnum, verður skrivaður niður á null. Allir partaeigarar fáa tó møguleika at seta nýggjan partapening í felagið, sigur hann.

Nevndarformaðurin vísir á, at samstundis, sum P/F Smyril Line vil ogna sær meirilutan av partabrøvunum í Fjord Line, seta partaeigarar í P/F Smyril Line eisini nýggjan partapening í føroyska felagið.

- Tilsamans er talan um 76 miljónir krónur, og tað eru Framtaksgrunnurin, Shetland Development Trust og íløgufelagið hjá Tryggingarfelagnum Føroyar, P/F Holding, ið seta peningin í felagið.

Hann heldur, at við hesum broytingunum gerst Smyril Line ein nógv størri og sterkari fyritøka enn áður.

- Skipini verða fleiri, rutunetið størri og inntøkumøguleikarnir betri. Við verandi positivu gongd í rakstrinum, rokna vit við, at virksemið fer at geva avlop í 2006, sigur Thomas Magnussen, nevndarformaður í P/F Smyril Line.



*- Fleiri fyrimunir eru við samstarvinum. Umframt at feløgini eru í sama vinnubólki, reka tey sama slag av skipum, ið sigla upp á Hanstholm og Bergen, og báðar fyritøkurnar marknaðarføra seg á sama marknaði, sigur Thomas Magnussen, nevndarformaður í P/F Smyril Line*